# Merkisdagar

**Diamantbrúdleyp**
Mánadagin 18. apríl 2011 kunnu hjúnini Eyðgerð og Tummas Bærentsen á Hellu í Kvívík hátíðarhalda 60 ára brúdleypsdag. Dagurin verður hildin saman við børnunum.

**Gullbrúdleyp**
Langafríggjadag tann 22. apríl hava hjúnini Árni og Kristina Joensen, Sørvági, gullbrúdleyp. Dagurin verður hildin saman við familjuni hjá Anniku Joensen, Reynstún 23, Argir.

**Silvurbrúdleyp**
24. apríl hava hjúnini Fía & Petur í Túni, Toftir, silvurbrúdleyp. Vælkomst verður á Svangaskarði, leygardagin 30. apríl frá kl. 17.00 Hjartaliga vælkomin.
*Fía & Petur*

**Brúdleyp**
Mikudagin 27. apríl giftast í Bangkok Kanitsara Chawna úr Thailandi og Ernst Magnussen av Nesi. Tey hava í hesum sambandi postadressu á Nesvegi 67, 655 Nes el. ernstmagnussen@gmail.com

**Brúdleyp**
Leygardagin 11.juni 2011 giftast Malan Ludvig, Tórshavn og Dávur Brøðraberg, Tórshavn. Vígslan verður í Vesturkirkjuni kl. 11, og nátturði verður í Sjóndeplinum í Tórshavn frá kl. 19. Tey, ið ynskja at hátíðarhalda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 251008 (Malan) ella á tlf. 215060 (Dávur) innan 15.mai 2011.



**80 ára føðingardagur**
Skírishósdag 21. apríl verður Martha Poulsen, Tórshavn, 80 ár. Dagurin verður hildin í Starvsmannafelagshølinum, J. H. Schrødersgøta 9 millum kl 17 og 21, har øll eru hjartaliga vælkomin



**Brúdleyp**
Leygardagin 30. apríl 2011 giftast Hanna Hanusardóttir Hansen, Fuglafjørður og Ingi Elmelund Petersen, Tórshavn. Vígsla og móttøka verður úti á skúlaheiminum við Marknagilsvegin kl.09.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 22. apríl fyllir Dana Hammer, Nes, 80 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 23. apríl í Missiónshúsinum Thabor á Toftum frá kl. 12 - 17, øll eru hjartaliga vælkomin.

**50 og 55 ára føðingardagar**
Mariane Haraldsen og Fróði Ólason Olsen, Viðargøta 50, Argir, fylla 50 og 55 ár. Føðingardagarnir vera hildnir í Róðrarneystinum 14.5 kl 18. Tað hevði glett okkum at sæð skyldfólk, vinir og kenningar. Vinarliga sigi frá á tlf. 311299 innan 1.5.11.

# Tøkkir & heilsanir



Túsund takk til øll tykkum, sum vóru við til at gera hjúnabandsdag okkara,
1. mai 2010, ógloymandi fyri okkum. Takk fyri heilsanir, gávur og hjálpsemi.
Serliga ynskja vit at takka tykkum, sum gjørdu løtuna í kirkjuni so sera góða og veitsluna aftaná so væleydnaða og hugnaliga. Við ynski um einar gleðiligar páskir!
**Dania & Svein**



Øllum tykkum, sum mintust til mín á ymsan hátt, tá ið eg var fermdur tann 10 oktober í 2010, takki eg hjartaliga.
Eg og familja mín ynskja øllum, familju, vinum og kenningum, einar gleðiligar páskir.
Bestu ynski
**Sjúrður í Botni Bertholdsen, Vágur**




**Góði elskaði Aaron**
Hjartaliga tillukku á 3 ára føðingardegnum. Jesuspápi signið framtíð tína.
**Omma og abbi á Láarvegnum**